Nr. 96/2019

Jákup Mikkelsen
Frimodt Rasmussen
Beinir Johannesen
Steffan Klein Poulsen
løgtingsmenn

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um støðuna á teimum trimum sjúkrahúsunum, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvat er samlaði kostnaðurin av at broyta nøvnini á teimum trimum sjúkrahúsunum?
2. Eru starvsfólk innan Sjúkrahúsverk Føroya í starvi hjá Sjúkrahúsverki Føroya, ella á tí sjúkrahúsi, tey hava sín gerandisdag?
3. Hava allir tríggir stjórarnir beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin?
4. Hví sendi umsitingin hjá landsstýrismanninum í februar mánaða í ár stjórunum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús bræv við boðum um, at hesir báðir stjórar ikki longur skuldu vera stovnsleiðarar í búskaparskipanini fyri ávikavist konturnar hjá Suðuroyar og Klaksvíkar sjúkrahúsi?
5. Fer landsstýrismaðurin at endurskoða menningarætlanina fyri Sjúkrahúsverk Føroya, og taka hana upp til nýggja politiska viðgerð?

Viðmerkingar:
Tað undraði almikið, tá Heilsumálaráðið brádliga boðaði frá, at sjúkrahúsini skuldu hava nýggj nøvn. Fráboðanin hevur elvt til mikla øsing. Og tað er ikki uttan orsøk. Tað tykist, sum myndugleikin ikki gevur sær far um, hvønn týdning sjúkrahúsini hava fyri lokalsamfelagið. Talan er ikki bert um seingja- ella arbeiðspláss, men um sjálvan samleikan í økinum. Eldsálir hava lagt lív og sál í arbeiðið, ættarlið eftir ættarlið, og tað eru hesar eldsálir, sum hava gjørt sjúkrahúsini til tað, tey er í dag. Nøvnini eru kjarnin. Tey nerta við kenslurnar. Talan er sostatt ikki bert um lítla og óskyldiga navnabroyting, men um eina kollvelting, ið kveistrar lokala samleikan til viks. Tað undrar almikið, at myndugleikin kemur við slíkari kollveltandi ætlan, tá spurningurin ikki hevur verið umrøddur politiskt. Nøvnini á sjúkrahúsunum eru tryggjað við lóg. Skulu tey broytast, skal lógin broytast. Til tess krevst ein politiskur meiriluti, og politiska skipanin er slett ikki spurd eftir.

Tá aðalorðaskifti var um Menningarætlanina í seinasta valskeiði, var ongin ivi um, at politiski viljin var, at stjórarnir á teimum trimum sjúkrahúsunum skuldu hava fulla ábyrgd av rakstrinum og játtanini á fíggjarlógini. Men tá stjórarnir vórðu settir, vórðu teir settir á einum sjúkrahúsi, men eisini hjá Sjúkrahúsverki Føroya. Tí er neyðugt at fáa greiðu á, um stigvís broyting er farin fram, har endin er, at øll starvsfólk verða sett í starv hjá Sjúkrahúsverki Føroya. Um so er, eru sjálvstøðugu sjúkrahúsini beind burtur. Tað var ikki politiska ætlanin. Hon stríðir beinleiðis í móti tingsins vilja.

Menningarætlanin leggur upp til, at Sjúkrahúsverk Føroya verður skipað eftir bygnaði, har sjúkrahússtjórarnir skulu samstarva, og á tann hátt finna fram til loysnir, og taka avgerðir til frama fyri okkara borgarar og samlaða sjúkrahúsverkið. Eingin ivi má vera um, hvussu leiðslubygnaðurin virkar.

Tá broytingar vórðu gjørdar fyri Suðuroyar og Klaksvíkar Sjúkrahús í búskaparskipan landsins í februar mánaða, elvdi tað til stóra mótstøðu, m.a. frá løgtingslimum, ið hevði við sær, at broytingarnar vórðu tiknar aftur. Eftir stendur tó spurningurin, ið ikki varð svaraður, og aftur er blivin aktuellur í sambandi við navnakappingina, hví umsitingin tók avgerðina av sínum eintingum.

Síðan menningarætlanin varð sett í verk, eru fleiri ivamál. Harumframt eru viðurskiftini í bygnaðinum ógreið. Tað er ivasamt, hvørjar heimildir eru galdandi hjá øllum stjórunum, tá talan er um tey trý sjúkrahúsini. Av tí sama kenna stjórar og starvsfólk seg ótrygg. Tískil er áhugavert at vita, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at endurskoða menningarætlanina fyri Sjúkrahúsverk Føroya. Ein menningarætlan, ið higartil hevur elvt til eina sera ivasama navnakapping, ógreiðar stjóraheimildir, ógreiðar fíggjarligar heimildir hjá stjórunum og mangt annað.

Á Løgtingi, 4. juni 2020

Jákup Mikkelsen
Frimodt Rasmussen
Beinir Johannesen
Steffan Klein Poulsen